Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins eftir fíggjarlógarviðgerð:

# Hetta kann enda við samgongusliti



*Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins: - Djúp frustratión valdar í samgonguni í kjalarvørrinum av fíggjarlógarviðgerðini. Eg vil fegin síggja, hvussu samgongan megnar at finna 100 til 200 mill. kr. í sparingum*

*Mynd Jens K. Vang*

**- Sera stór ónøgd er við fíggjarlógaruppskotið millum samgongutingmenn. Frustratiónirnar eru stórar. Øgiligar rembingar eru millum stóru samgonguflokkarnar. Óli Breckmann leggur upp til, at øll Fíggjarnevndin mannar seg upp móti landsstýrinum staðfestir Jóannes Eidesgaard nú eftir fíggjarlógarviðgerðina og heldur tað ikki vera óhugsandi, at hetta kann enda við samgongusliti**

FÍGGJARLÓG 2003

*Jan Müller*

- Eg havi verið við til at viðgera fíggjarlógaruppskot í 12 ár, men hetta havi eg ongantíð upplivað fyrr sigur Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins eftir 1. viðgerð av fíggjarlógaruppskotinum fyri 2003. Hann sipar her til ta løgnu undirtøku, sum uppskotið fær frá samgonguni og ta stóru óvissu, sum er rundan um uppskotið. - Hetta minnir mest um eina pseudoviðgerð, har man ikki veit, hvat tað er man viðger. Man fær eitt uppskot á borðið, men veit, at tað, sum kemur aftur frá Fíggjarnevndini, um nakað kemur har frá í heila tikið, verður nakað heilt annað. Jóannes Eidesgaard sigur, at tað er sjálvandi vanligt, at tað henda broytingar undir viðgerðini. Men so stórar broytingar, sum tær, ið eru fráboðaðar, eru heilt óvanligar.

Floksformaðurin vísir á Norðoyartunnilin, sum skal fíggjast við 32,5 mill. kr og sum einki oyra er sett av til. Har er skattalættin, sum er fráboðaður at kosta 55 mill. kr. frá 1. januar, og har er heldur einki sett av. Síðani kemur Postverkið, sum er eitt púra óloyst mál og tykist ongan góðan at hava. Har eru 8 mill. kr. Nú nærkast teimum 100 mill. kr.

Bæði Kristina Háfoss og Tórbjørn Jacobsen úr Tjóðv. og Óli Breckmann úr Fólkafl. hava víst á, at tað skulu sparast millum 100 og 140 mill. kr. Óli hevur entá nevnt 200 mill. kr.

- Tað er ikki óvanligt, at tað fara fram justeringar í Fíggjarnevndini men tó ikki nakað, sum líkist hesum. Her er talan um, at tað skuldu henda umrokeringar fyri millum 100 og 200 mill. kr., áðrenn fíggjarlógin kemur aftur á tingborð. Tað lysti meg at síggja, hvussu hon tá fer at síggja út. Javnvágin er jú knív skørp sum er tvs. at eftir avdráttir eru 2 mill. kr. at rudda við. Hvar fer man so inn og sker fyri at finna upp til 200 mill. kr. í sparingum spyr formaður Javnaðarfloksins, sum sær fyri sær sera stórar rembingar millum teir báðar stóru samgonguflokkarnar. Tjóðveldisfólk halda, at tað eru teirra øki hetta fer at ganga út yvir, meðan fólkafloksfólk halda, at tað eru bert teirra fólk, sum spara.

### Andsøgn oman á andsøgn

Undir fíggjarlógarviðgerðini nevndi framsøgumaður Javnaðarfloksins, Vilhelm Johannesen, at hann var sinnaður at fremja sparingar í almenna bygnaðinum og sipaði her til tey mongu nýggju ráðini, sum eru komin í kjalarvørrinum á bæði tí seinastu og hesi nýggju samgonguni. Meðan tað vóru seks stýri fyri fáum árum síðani, er talið økt til níggju undir verandi samgongu.

Jóannes Eidesgaard ivast í, um partamaður hansara fer at verða hoyrdur í Fíggjarnevndini, tí talið av ráðum er jú økt fyri at fáa ta politisku kabaluna at ganga upp og entá aðru ferð, fyri at Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin hava kunnað sitið við valdinum.

- Her er alt í andsøgn við hvørt annað. Um somu tíð sum hesir flokkar økja talið á landsstýrisráðum og harvið økja munandi um almennu fyrisitingarútreiðslurnar tosa teir nú um at fremja sparingar í almennu fyrisitingini. Hetta hongur ikki saman. Tá Fólkaflokkurin hevur sitið í andstøðu - og hann er so mikið frekur at gera tað í samgongu eisini - hevur hann geilað tjakið upp um ta almennu umsitingina, sum verður pumpað upp og bólgnar og bólgnar. Eingin hevur verið meira grátigir enn júst teir. So eisini her er andsøgnin í hásæti.

Jóannes Eidesgaard sær fyri sær, at samgongan fer at koma sær út í nakrar veldugar trupulleikar fyri yvirhøvur at fáa fíggjarlógina at hanga saman, skulu teir halda tann málseting teir hava sett sær, nevniliga at útreiðslurnar skulu vera minni enn inntøkurnar. Hann dugir annars illa at ímynda sær, at samgongan hetta fyrsta árið torir at budgetera við einum halli. Tað vildi eisini verið ímóti tí yvirornaðu strategi samgongunflokkarnir hava um ein sjálvberandi búskap.

Formaður Javnaðarfloksins metir eisini, at samgonguflokkarnir sita í einum veruliga dilemma í løtuni, tí tað, sum spøkir og fer at spøkja aftur og aftur komandi tíð verður sannroyndin, at teir hava skorið 366 mill. kr. av blokkinum. -Hetta hava vit ávarað ímóti. Niðurskurðurin var alt ov drastiskur. Hetta er misseran. Tóku teir t.d - og sum vit mæltu til - og skóru blokkin við góðum 100 mill. kr., so høvdu vit framvegis havt 250 mill. kr. at gera gott við, og tá høvdu vit havt ein rímuligan møguleika at havt eina skilagóða fíggjarlóg. Men tað verður ringt hjá Tjóðveldinum at viðganga, at vit, sum ávaraðu móti niðurskurðinum, fingu rætt í síðsta enda.

Undir viðgerðini av fíggjarlógini varð fleiri ferðir funnist at løgmanni fyri ikki at vera tilsteðar. Eisini Jóannes Eidesgaard er ørkymlaður av fráveru løgmans. -Hann var við tann fyrsta dagin og hava vit ikki sæð hann síðani. Hetta er ein tann mest grundleggjandi viðgerðin á tingi, tí hon er fundamentið fyri alt komandi árið.Tí er tað ótrúliga løgið, at samgonguleiðarin als ikki luttekur í viðgerðini. Um hetta er tí, at hann ikki sær nakra loysn á málinum ella ikki dugi eg ikki at siga. Men tað eru øgiligir spenningar millum samgongumenn, og nógvir teirra eru sera ónøgdir við uppskotið. Tað havi eg so ongantíð upplivað áður.

### Fíggjarnevndin í andstøðu til landsstýrið

- Hvat heldur tú verður úrslitið av hesi ónøgd og óvissu?

- Eg havi heitt á andstøðutingmenn í Fíggjarnevndini, at man nú fer at leggja trýst á samgonguna. At man setur seg aftur á og spyr, hvat teirra boð er. Tað kann ikki vera meiningin, at andstøðan fer inn og ger eitt uppskot, sum samgongan kann svølgja. At vit kunnu luttaka í onkrum konstruktivum er tó sjálvsagt.

Jóannes Eidesgaard staðfestir annars, at Óli Breckmann, formaður í Fíggjarnevndini, roynir at manna nevndina upp móti landsstýrinum. Hann sigur, at nú má øll Fíggjarnevndin, bæði samgonga og andstøða standa saman og seta landsstýrið uppá pláss. Tvs. tað er líkasum, at vit fáa eitt nýtt landsstýri í Fíggjarnevndini, tí man har ikki hevur álit á, at tað, sum er komið frá landsstýrinum, er gott nokk.

Formaður Javnaðarfloksins kemur bert til eina niðurstøðu eftir alt hetta, og hon er, at vit hava ein djúpt frustreraða samgongu í løtuni. - Úttalilsini hjá báðum landsstýrismonnunum í SVF hóskvøldið bera eisini tann sama vegin. Eg dugi ikki at síggja annað enn, at samgongan er á veg út í eina undirskotsfíggjarlóg. Og spurningurin, hvussu stórt undirskotið verður, veldst eisini um, hvussu samgongan ætlar at tacla mongu málsøkini. Hvat t.d. við Landssjúkrahúsinum. Kann samgongan liva við, at leiðslan á sjúkrahúsinum fyri at finnasparingar hevur givið kommunulæknunum boð um at halda aftur við at leggja sjúklingar inn? Alt bendir á, at samgongan er við at koyra seg sjálva fasta. Fíggjarlógin fer tí uttan iva at elva til nakrar álvarsligar rembingar í samgonguni - og tað er ikki óhugsandi, at hetta kann enda við sliti.

- Fer Javnaðarflokkurin at ganga við til stórar sparingar?

-Tað gera vit ikki.



# Ferðasambandið til Mykines ónøktandi

**Ferðasambandið til Mykines er í løtuni als ikki nøktandi. Hetta halda bæði mykinesmenn og tingmaðurin í Vágoynni, Marjus Dam. Hóskvøldið kom Súlan aftur til Mykines fyri fyrstu ferð í næstan 14 dagar**

SAMFERÐSLA

*Ingrid Bjarnastein*



*Esbern í Eyðansstovu heldur, at tá Strandferðslan kann hava tvær leiðir inn á Skálafjørðin, so átti hon eisini at funnið eina hóskandi rutu til Mykines*

*Mynd: Edvard Joensen*

Sum er í løtuni, er ferðasambandi til Mykines alt annað enn nøktandi. Serliga nú ringa veðrið er farið at gera um seg, er serliga ringt at sleppa til og frá oynni.

– Støðan er kanska ikki so góð, sum hon plagar at vera, sigur Esbern í Eyðansstovu, mykinesbúgvi.

– Báturin var her hóskvøldið, men her hevur verið stak vánaligt veður til at sigla seinastu tíðina. Hetta órógvar sjálvandi, og tað er sjálvsagt keðiligt.

Esbern í Eyðansstovu vísir á, at tað eru fleiri, sum ikki tora vestur til Mykines, tí tey eru bangin fyri at gerast veðurføst. Tyrlan plagdi at gera eykatúrar um tørvur var á tí, men soleiðis er ikki longur.

Súlan, sum røkir siglingina til Mykines, siglir týsdag, hósdag og leygardag – eftir ferðaætlanini. Er veðrið ikki til vildar, siglir hon als ikki, og túrarnir verða avlýstir.

Hetta ger, at um heystið kunnu mykinesmenn liggja uttan bátasamband í fleiri dagar, ja, eisini vikur.

– Í fjør varð siglt eftir ferðaætlanini, men vóru líkindi ikki til at sigla tann ávísa dagin, sum ferðaætlanin segði, so sigldi Súlan fyrsta dag kyrt varð aftur, greiðir Esbern í Eyðansstovu frá. Hann heldur, at soleiðis átti tað avgjørt eisini at verið nú.

– Nógv tora heldur ikki at sigla vestur, tá tað er óslætt og sjógvurin flýtur inn á dekkið. Hetta er ein óheppin støða, og eg haldi, at tá man kann hava tvær rutur inn á Skálafjørðin, so átti man eisini at funnið eina passandi til Mykines.

### Feilurin

Kjeld Nattestad, sum er virkandi borgarstjóri í Mykinesi sigur, at feilurin liggur í útbjóðingartilfarinum hjá Strandferðsluni. Tað er nevniliga síðani at mykinesleiðin varð útlisiterað, at skilið er vorðið til tað, sum tað er í dag.

– Treytirnar hava verið ov ógreiðar. Avtala er gjørd við Skúvadal um at sigla eftir galdandi ferðaætlan, og tí verða túrar ikki gjørdir, sjálvt um ongin túrur hevur verið til Mykines í fleiri dagar, sigur Kjeld Nattestad.

– Hetta setur mykinesmenn í eina verri støðu við at einskilja rutuna, og tænastustøðið lækkar munandi. Eisini verður tað meira mótfallandi og tungt hjá mykinesmonnum, og hetta tekur mótið frá fólki, sigur Kjeld Nattestad, sum heldur, at Strandferðslan hevur sloppið sær av við tær lættastu ruturnar á léttasta hátt.

Tað mesta av fólkinum í Mykinesi brúkar tyrluna at ferðast aftur og fram við, um pláss er. Hetta kemst av, at tyrlan flýgur regluligari og flýgur í næstan øllum veðri. Tyrlan er í Mykinesi tríggjar dagar um vikuna – mikudag, fríggjadag og sunnudag. Fríggjadag ger hon tveir túrar.

– Í fjør leigaði Strandferðslan Silju, og tá sigldi Silja við fólki og Súlan varð brúkt til frakt. Henda skipanin er tann frægasta vit hava havt, og er tað hesa skipanina eg hevði kunnað hugsað mær at fingið aftur, sigur Kjeld Nattestad, virkandi borgarstjóri at enda.

### Tingmaðurin ónøgdur

Eisini tingmaðurin fyri Vágoynna, Marjus Dam, er stak ónøgdur við siglingina hjá Súluni.

Hann metir, at tað er av alstórum týdningi, at okkurt verður gjørt við hesa leiðina beinanvegin.

– Tað skuldi ikki verið meira enn rímiligt at gjørt eitt hóskandi útbjóðingartilfar, sum hóskar seg til oynna, sigur Marjus Dam.

– Nú skulu heystfjøllini gangast, og tað er týdningarmikið, at teir fáa menn út at hjálpa sær. Og at onki samband er við útoyggjarnar er ikki til at góðtaka. Vit hava fingið nógv álit um økismenning og útoyggja politikk, og so hendir hetta her!

# Ongin meginregla

**Bjarki Skúvadal, sum hevur Mykinesleiðina undir hond, sigur, at í útbjóðingartilfarinu m stendur onki um, at túrar sum verða avlýstir, skulu siglast tá veður er til tess**

SAMFERÐSLA

*Ingrid Bjarnastein*

Sjálvt um onki stendur í útbjóðingartilfarinum um, at túrar, sum verða avlýstir, skulu siglast seinni tá veðrið er til vildar, so hevur Sp/f Skúvadal longu siglt tveir eyka túrar.

– Menninir, sum sigla fyri okkum skulu hava løn, sjálvt um túrarnir verða avlýstir, tí teir skulu jú verða til taks um tørvur er á teimum. Men túrarnir, sum verða avlýstir vegna veður, verða ikki sigldir inn aftur, tá veðrið er til vildar. Onki stendur í útbjóðingartilfarinum um, at hetta skal gerast, og tað er óheppið, metir Bjarki Skúvadal, sum hevur Mykinesleiðina undir hond.

– Vit hava gjørt tveir eyka túrar, tí biðið hevur verið um tað, men hetta er ongin meginregla.

Hjá Sp/f Skúvadal verður sjálvsagt harmast um hesa óhepnu støðu, men felagið hevur ikki skyldu til at taka avlýstar túrar upp aftur.

# Bjarni sigur jú

**Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, heldur fast upp á, at Súlan siglir túrarnar, ið verða avlýstir vegna veður, so skjótt veðrið er til tess**

SAMFERÐSLA

*Ingrid Bjarnastein*

Landstýrismaðurin í vinnumálum Bjarni Djurholm vissar Sosialin um, at túrarnir, ið Súlan avlýsir vegna veður, verða sigldir so skjótt veðrið er til tað.

– Umsitingin her hevur kannað tað, og túrarnir, ið verða avlýstir vegna veður, verða sigldir so skjótt viðrar, sigur Bjarni Djurholm, sum vísir okkum til fólkaflutningsdeildina á Strandferðsluni um vit vita um nakran ítøkiligan túr, sum ikki er sigldur, og heldur ikki innheintaður aftur, tá viðraði.

Bæði mykinesmenn og felagið, ið rekur siglingina til Mykines, siga, at hetta er alt annað enn vanlig mannagongd.

## Reidar ikki at hitta

Roynt hevur verið at fáa eina viðmerking frá Reidari Nónfjall, stjóra á Strandferðsluni, men hetta hevur ikki borið til vegna fundarvirksemi.

**-ib**

# Runnu í heystveðrinum

SKÚLARENNING

*Birita Poulsen*

Nú er tíðin komin aftur, at skúlarnir í teimum flestu støðunum runt landið hava renningardag, og teir flestu næmingarnir eru farnir í ítróttaklæðini og út at renna. Sjálvt um veðrið ikki er av tí besta. Men tað sær út til, at teir einki leggja í ringa veðrið. Í Tórshavnar Kommunuskúla møta teir yngru næmingarnir møta kl. 8.30 og teir eldru kl 10. Men teir yngru næmingarnir fara ikki einsamallir, teir fáa eisini lærararnar við sær at renna. Men teir renna ofta ikki líka langt sum teir eldru. Teir yngri næmingarnir renna sum oftast eini 2,5 til 5 km. Teir eldru renna 10 km, men har finnast tó nakrir, sum eru ov dovnir, at teir renna tað sama sum teir yngru. Men tað er upp til børnini, hvussu nógv tey renna.



*Tað er nokso strævið. Tað sæst eisini á børnunum, tá tey koma niðan har við Villingardal, at tey eru ógvuligani troytt, men tey er so mikið røsk, at tey halda á allíkavæl*

Leiðin hjá børnunum, ið ganga í Komunuskúlanum, er fyrst úr Kommunuskúlanum, niðan til svimjihøllina, framvið Hoydølum, niðan eftir Mannbrekku, eftir vegnum langa og so oman aftur við Berjabrekku og síðani oman aftur í skúlan, tað er bert 5 km. Tey, sum vilja renna 10 km skulu heilt niðan ímóti vatnverkinum í Villingardali, áðrenn tey snara av við Berjabrekku. So tað er nokso strævið. Tað sást eisini á børnunum, tá tey koma niðan har við Villingardal, at tey eru ógvuligani troytt, men tey er so mikið røsk, at tey halda á allíkavæl.

Næmingarnir fáa eina striku á hondina fyri hvønn kilometur, teir hava runnið, so at tey kunnu vátta, hvussu langt teir hava runnið.

Tá børnini hava runnið, fáa tey hvør sítt sunkist, og eisni fær næmingurin eitt heiðursbræv, ið vísir á hvussu langt næmingurin hevur runnið. Og so er tað bara at fara heim. Eingi skúlating, sleppa frá at sita og lurta eftir lærarunum.

So eru næmingarnar eisini so mikið hepnir, at teir hava heystferiu nú, ið er í eina heila viku.